


**SAMD**

*Formenninir í trimum av teimum fýra ungmanafeløgunum hjá stóru politisku flokkunum eru samd í spurninginum um rættin hjá samkyndum og um skrásett parlag. HUXA vil ikki úttala seg um etisk mál. Formenninir eru frá vinstru: Bergur A. Dalsgarð, Sosialistisk Ung, Gunhild D. Niclasen, Unga Tjóðveldi, Hanus Samróð, HUXA og Katrin H. Petersen, Unga Sambandið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

– Vit skulu jú eisini minnast til, at floksleiðslan stendur við ábyrgd mótvegis einari rúgvu av veljarum, og tað er ein ábyrgd, sum vit ikki hava, vísir Katrin Petersen á.

Og júst tey etisku málini hava eina serliga støðu.

– Tað er eitt rák millum ung, tá tað kemur til tey etisku málini, ikki bert í Føroyum, men kring allan heim, og hetta rákið avspeglar ikki støðuna sum tey eldri, og harvið tey, sum sita við valdinum, hava, sigur Bergur Dalsgarð.

Og ein av brennandi etisku spurningunum er skrásett parlag.

– Eg kann siga, at vit í Unga Tjóðveldi taka undir við skrásettum parlag, sigur Gunhild Niclasen.

Og Bergur Dalsgarð er samdur.

– Hetta er eisini nakað, vit taka undir við, í hvussu er upp á longri sikt. Spurningurin er bara, um vit í Føroyum eru búgvin til at seta eina slíka lóg í verk, og tí er spurningurin eisini, um vit skulu gera tað her og nú, sigur hann.

Og Katrin Petersen tekur undir við teimum báðum.

## Neyvan í bræði

Teir fýra formenninir halda tað tó vera ivasamt, um nakað uppskot um samkynd og ættleiðing ella skrásett parlag fer at koma í nærmastu framtíð.

– Tað verður neyvan til tað, men eg vóni, at tá vit í ungmannafeløgunum hava tikið málið upp, fer tað at skapa eitt kjak millum politikarar, og tað er somuleiðis mín vón, at onkur í Tjóðveldi fer at taka undir við okkara sjónarmiðum. Flokkurin er ikki samdur í hesum málinum, so mikið haldi eg meg vita, sigur Gunhild Niclasen.

Bergur Dalsgarð heldur ikki, at tað hevur størstan týdning, at vit taka eina støðu til málið.

– Tað, sum hevur týdning, er, at vit seta fokus á málið og viðurkenna trupulleikan. Lat okkum so fáa fleiri fakta á borðið, so vit kunnu taka eina støðu út frá tí. Við at viðurkenna trupulleikan fáa vit eisini eitt kjak um málið, sigur Bergur Dalsgarð.

Sosialistisk Ung hava ikki tikið støðu til, um tey fara at taka málið upp við floksleiðsluna, men Bergur Dalsgarð heldur, at hetta er eitt mál, ið átti at havt áhuga hjá Javnaðarflokkinum, tí tað hevur eisini við javnstøðu at gera.

Eisini Katrin Petersen er ivasom, tá tað kemur til spurningin at ávirka floksleiðsluna í hesum málinum.

– Vit mugu minnast til og virða, at talan er um eitt eldri ættarlið, við øðrum virðum og aðrari mentan enn hjá okkum ungu. Og eg ivist í, um vit fara at royna at gera okkara ávirkan galdandi í spurninginum um samkynd og ættleiðing og um skrásett parlag, sigur Katrin Petersen.

Øll fýra eru tó samd um, at tey eig at virða rættin hjá teimum eldru at hava ta støðu, tay hava, um enn tey ikki virða sjálva støðunata.

Helst verður eingin broyting í spurninginum um samkynd og ættleiðing og á spurninginum um skrásett parlag, fyrr enn nýggja ættarliðið tekur við, siga teir fýra floksformenninir í politisku ungmannafeløgunum hjá stóru flokkunum.

leo@sosialurin.fo